# Miðvikan

Gutti Sørensen:

# Bjargaður á ríkissjúkrahúsinum av skerpikjøti

**Hóast tað er skrivað nógv av fiskimannasøgu, so er hon so umfatandi, at tað altíð kann koma nakað afturat. Gutti Sørensen hevði eisini upplivað eitt sindur av hvørjum. Hann andaðist í seinastu viku beint eftir at hava givið sítt seinasta íkast til hesa grein**

Vit vóru tíðliga í summar inni á gólvinum hjá tí 89 ára gamla Guttorm Sørensen , vanliga nevndur Gutti í Innistovu, í Hvannasundi. Hansara lív hevur sum hjá so nógvum øðrum bygdardreingjum ein stóran part verið á sjónum.

Gutti var sonur Gulak Andreas Sørensen f.1893, sum í 1917 giftist við Onnu Gudrun Olsen úr Depli.

Systkini hjá Gutta vóru Andreas (Dia) f.1917 Gunnhild f. 1919 og Anna Elisabeth Marie f. 1927.

### Liviligt í Hvannasundi

Gutti greiddi frá, at tað var liviligt norðuri í Sundi. Gamalt er, at hann ið átti tráðu og pott, leið ikki hungur. Vit kastaðu ofta nót og fingu nógvan seið. Seiður er góður matur, og kann hagreiðast á ymiskan hátt. Neytini ótu eisini nógvan seið. Livurin varð avreidd í handlinum.

Útróðrarpláss var Hvannasund gott. Gamli Mortan í Hvannasundi búði eitt tíðarskeið í Innistovu. Pápi róði út saman við Mortani, tá ið hann bygdi í 1910. Útróðurin gav so nógv av sær, at hann dekkaði tímalønina fyri húsini.

Eg minnist væl Mortan. Kanska onkur vil vita, hvønn av synunum ella abbasynunum Mortan líktist. Besta svarið er Mortan hjá Andreasi. Báðir hava verið væl skornir fyri tungubandið!

Vit skóru torv í Viðvík. Tað var gott torv, men tað var langt at ganga, um 1½ tíma.

Torvið varð ført heim í báti. Hetta kundi vera vandamikið, men hjá okkum hendi so eingin álvarsom vanlukka. Tað hendi seg tó einaferð, at báturin sakk fullfermdur av torvi í Viðvík, men hetta spældi væl av.

Vit vóru so væl fyri, at pápi var bóndi. Tí vóru vit mest sum sjálvforsýnaði við nógvum.

Vit høvdu 2-3 kýr, og hetta gav nóg mikið av mjólk og eitt sindur afturat.

Hvannasund lá væl fyri í mun til útoyggjarnar annars.

Tað var ofta, at fiskimenn úr Fugloy og Svínoy lógu veðurfastir í Sundi á veg til hús. Teir búðu í bóndahúsum og gjørdu eisini nyttu fyri seg. Tað er ikki einki, sum liggur eftir teir av velting.

Teir plagdu eisini at karða og spinna og at vera við at kasta nót, meðan teir bíðaðu. Tískil kundu teir hava nógvan seið heim við sær, eisini til neytina, tá ið teir loksins sluppu til hús.

### Máttu í skúla við báti

Skúlagongdin hjá børnum í Hvannasundi var øðrvísi enn hjá flestu øðrum. Vit máttu við báti í skúla. Múli, Depil, Norðtoftir, Norðdepil og Hvannasund var ein sókn. Viðareiði var við inntil 1950. Men



*Teirra hús er nærum á sjónum. Her er grind. Húsini nummar 2 f.v. eru tey hjá Gutta og Ruth*



*Ruth og Guttorm*

bygdirnar liggja hvør sínu megin sundið, og skúlin hjá børnunum úr Hvannasundi var í Norðdepli.

Vit máttu tískil fara við báti í skúla. Hetta kundi taka sína tíð, tí tað var ikki nakar fastur fartur.

Vanliga gekk tað skjótt at koma yvir um sundið. Men tað kundi taka langa tíð at koma heim aftur. Tað var ofta, at maðurin, sum førdi okkum yvir um á morgni, fór til útróðrar. Tí mátti bíðast, til hann kom aftur av útróðri at sleppa til hús aftur. Tað kundi taka sína tíð.

Tað tók einar 3-4 minuttir at rógva um sundið. Men tað vóru ikki altíð góð líkindi. Tað hendi seg eisini, at ein mamma ikki vildi lova barninum at fara. Kortini hendi eingin vanlukka av hesi skúlaferðing.

Vit gingu bert í skúla annan hvønn dag. Tað var bert ein skúlastova, so fleiri klassar vóru saman.

Eisini vóru skiftandi skúlatíðir. Tær vóru antin frá kl. 10-12 ella kl. 12-14. Lærari var Anna Djurhuus, sum var gift við skaldinum Janus Djurhuus. Hon var ein megnarkvinna. Anna kundi læra børnini alt, sum tey yvirhøvur kundu taka ímóti.

Pedagogur man hon hava verið góður. Dia bróðir dugdi ikki so væl við tær donsku roknibøkurnar. Men so gjørdi Anna øll roknistykki um til seyð. Tá bar væl til. Hjá honum var og bleiv alt seyður.

### Hvat mundi pápi hava droymt?

Eg fór til skips við skonnartini Karen í 1936. Vit róðu út við bátum í Grønlandi. Kaj Johannesen var skipari.

Eg fór aftur við Kaj við John Bull í 1937 og 1938. Eitt serligt minni havi eg frá hesi tíðini. Eg átti róðurtørn ein sunnudag seinnapart í 1937. Sum vit komu slóðandi, tók skipið botn, uttan at nakar stórvegis skaði hendi.

Tá ið vit komu heim aftur var tað á nátt. Beinanvegin fór pápi at fregnast, um vit høvdu borið við botn. Tað kundi eg bert játta.

"Stóð tú við róðrið?" spurdi pápi. Jú, tað gjørdi eg. So var ikki meira tosað um hetta.

Eg legði bert í hetta, at pápi mundi hava droymt okkurt. Men løgið var tað.

### Við gamla Skálaberg og fekk tuberklar

Eg fór við fyrsta Skálaberg í 1939. Tá var ikki sama luksus við trolarum sum í dag. Vit vóru yvir 30 mans. Flestu menninir búðu í tí eina lugarinum. Har var sera tronligt, koyggjurnar vóru eisini í trimum hæddum.

Skálaberg var ikki stórur. Hann kundi taka 140 tons í saltfiski. Men væl lá fyri at fiska. Tað var altíð rokfiskarí.

Eg var við Skálaberg í Barentshavinum fyrst í september 1939, tá ið seinni heimsbardagi byrjaði. Tá vórðu vit heimkallaðir av reiðaríinum.

Ì 1940 fekk eg ikki tuberklakort. Tað vísti seg, at eg hevði fingið tuberklar, og eg lá á sanatoriinum í eitt heilt ár.

Eg slapp heim, og mátti ansa væl eftir mær. Men eg hevði ikki áhuga fyri øðrum arbeiði, vildi bert sleppa aftur á sjógvin.

### Millum teir seinastu "til lands"

Í 1941 bygdi eg mær eitt seksmannafar saman við Ova Olsen úr Norðdepli. Eg fór so at rógva út. Ove seldi mær sín part av bátinum eftir tveimum árum.

Í 1942 fór eg á skiparaskúla, forrestin saman við Martin Sivertsen, sum gjørdist ein kendur skipari. Men eftir bert 10 dagar mátti eg gevast vegna sjúku.

Í 1945 fór eg til Íslands at rógva út frá Seyðisfjørðinum. Saman við mær var Hans Edmund og Niels Sandir. Tískil var eg millum teir seinastu, sum vóru "til lands" í Íslandi.